## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# 104 ár og 111 eftirkomarar

*Myndir Eirikur Lindenskov*

Leygardagin var stórur dagur á Ellisheiminum í Havn, tí elsta fólk í Føroyum, Anna Askham fylti 104 ár. Tað er sjáldsamt, at fólk gerast so gomul, og í nýggjari tíð eru tað bara Drikka á Fløtti við Gjógv, sum gjørdist 105 og Jógvan Hansen í Vestmanna, ið gjørdist 104, ið hava rokkið so høgan aldur.

Nógv fólk nýttu høvi at heiðra Onnu á føðing-ardegnum leygardagin - og sigast má, at riðilin er stórur, sum er undan henni - heili 111 fólk.

Anna og maðurin, Símun Askham, fingu seks børn. Av teimum hava fimm hava hildið gullbrúdleyp.

Ommubørnini eru 27 í tali, langommubørnini 59, meðan oldurommubørnini eru 19.

Anna hevur verið einkja seinastu 37 árini.




*Tað er ikki á hvørjum ári, at slík køka er at síggja!*



*Døtrarnar Martha og Begga saman við mammuni, Onnu Askham, sum fylti 104 leygardagin*



*95 ára gamla Martha Matras, sum er systir Onnu, býr eisini á Ellisheiminum. Her sita tær saman við Ellu Askham, sum var gift við Archibald Askham, sum var bróðir mann Onnu, Símun Askham*



*Døtrarnar Martha og Sonja saman við mammuni*

## Nakrar hendingar í Havn í 1915

### tað árið Anna Askham bleiv konfirmerað:

- "Slottstrappurnar" sum ganga upp til Fólka- og Landstingssalin á Christiansborg (78 trin), gjørdi havnarmaðurin Jákup Andr. Arge (ella "Jampan" sum hann bleiv nevndur millum havnarfólk) í Rættará í 1915. Trappurnar vórðu settar upp á Christiansborg í 1916. Nevnast kann at tann eina trappan er 7 fót breið, meðan hin er 3 fót breið. Trinini eru 1 fót djúp og tjúgdin er 1 tumma.
  Jampan var so umhugsin, at hann gjørdi eitt eykatrin, sum hann hevði við sær, um tað bleiv neyðugt. Men hesum fekk hann ikki brúk fyri. Alt passaði sum tað skuldi.
- Lanternurnar á Skansanum blivu tiknar niður, og fýrurin kom upp í staðin. Eisini tann høga veðurmasturin á Skansanum varð sett upp í 1915.
- Fyrsta Ólavssøkuteitið kom í 1915. Tað var Poul Niclasen sum lat hetta hefti prenta.
- Orðið "fysikus" verður strika og orðið "amtslæge" kom í staðin.
- Fólkatalið í Havn í 1915 var 2.302.
- Og so ein, eitt sindur uttan fyri Havnina, og tó: "Amalienborg" fekk fyrstu bindimaskinuna í 1915. Tvey ár framman undan, í 1913, fekk Havnin sína fyrstu bindimaskinu. Tað var havnarkonan Johanne Jensen, sum tann fyrsti føroyingurin ið innflutti eina "Husquarna" bindimaskinu úr Svøríki.



*Svigarsynirnir, Rókur Dalsgaard og John Justinussen »beundra« átuligu køkuna*